## Edward Kennedy deyður

Amerikanski senatorurin Edward Kennedy er deyður, 77 ára gamal. Hann fekk krabbamein fyri einum ári síðani. Edward Kennedy kom í Senatið fyri statin Massachusetts í 1962, tá bróðurin John F. Kennedy tók við sum forseti, og hann varð sjey ferðir afturvaldur í Senatið. Edward Kennedy hevði stóra ávirkan á amerikanskan politikk og var hildin vera góður semingsmaður. Hann var dyggur stuðul hjá Barack Obama, forseta. Edward var rann yngsti av teimum fýra Kennedy-brøðrunum. Joseph Kennedy doyði í flogvanlukku undir seinna heimsbardaga, og John F. Kennedy og Robert F. Kennedy vórðu myrdir.




## Sementvirki í kreppu

Tann stóra sementverksmiðjan á Akranesi í Íslandi er komin í trupulleikar, tí eftirspurningurin er minkaður. Málið er komið á borðið hjá stjórnini í Reykjavík, og sambært fjølmiðlunum hava í hvussu er summir politikarar hug at veita virkinum eina ella aðra hjálp. Sagt verður, at letur verksmiðjan á Akranesi aftur, noyðast íslendingar at innflyta sement úr Danmark, til verksmiðjan møguliga kann byrja aftur. Eitt uppskot, sum er nevnt, er, at tað almenna skal bara brúka íslendskt sement til sínar verkætlanir.

## Hava tjent 141 milliónir krónur upp á Breagh-søluna

OLJUVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Faroe Petroleum avgreiddi í gjár søluna av sínum 10 prosentum av Breagh gasskelduni, sum liggur í syðra parti av Norðsjónum. Keypari er RWE Dea UK SNS Limited. Søluprísurin er umleið 41,6 milliónir pund, sum er umleið kr. 216 milliónir krónur, umframt rentur og ávísar útjavningar.

Felagið hevur gjørt íløgur í Breagh uppá 8.8 milliónir pund, sum er umleið 75 milliónir krónur, og vinningurin er gjørdur upp til umleið umleið kr. 141 milliónir krónur.

Við søluni av Breagh hevur Faroe Petroleum nú 324 milliónir krónur av tøkum peningi.

- Enn er sølan av Trym gasskelduni, sum varð kunngjørd í mai í ár, ikki endaliga avgreidd. Trym sølan fer at økja um tøka peningin hjá felagnum, sigur felagið í tíndaskrivi.

Felagið sigur víðari, at við at gagnnýta loyvisportiføljuna og inntøkur frá framleiðslu á ein skilagóðan hátt, hevur felagið megnað at fíggja framhaldandi leitivirksemi, sum gevur grundarlag fyri at økja um virðini hjá partaeiganum framyvir. Verandi boriverkætlan fevnir um níggju brunnar. Hol varð sett á tann fyrsta av hesum, Glenlivet, leygardagin. Boriverkætlanin hjá felagnum verður øll fíggjað við tøka peninginum hjá felagnum.

## Faroe Petroleum borar nú Glenlivet brunnin

OLJUVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Faroe Petroleum fór leygardagin undir at bora á Glenlivet leitimiðinum, ið liggur vestan fyri Hetlandsoyggjarnar. Felagið fekk 10% av Glenlivet loyvinum í 2008 frá DONG E&P UK Ltd., sum afturfyri fekk 10% av Glenshee loyvinum.

Glenlivet er eitt stórt gass leitimið, sum liggur umleið 15 km frá komandi Laggan gassrørleiðingini, ið ætlanin er at leggja til Sullom Voe á Hetlandsoyggjunum. Leitimiðið líkist fleiri líknandi gassfundum á økinum.

Verður gass funnið í rakstrarverdum nøgdum á Glenlivet leitimiðinum, kann tað gerast ein stórur partur av tí ætlaðu gassskipanini vestan fyri Hetland, sum tekur støðið í komandi Laggan útbygginini.

Fyristøðufelag á Glenlivet loyvinum er DONG E&P UK Ltd., sum eisini eigur 20% av Laggan. Tað verður boripallurin Transocean Rather, sum borar fyri samtakið. Boringin tekur væntandi 40 dagar.

Glenlivet er ein lovandi boring, ið kann fáa stóran týdning fyri økið vestan fyri Hetland. Boringin er ein av tveimum í boriætlanini hjá Faroe Petroleum á økinum í 2009. Hin brunnurin er á Tornado leitimiðinum, sum skal borast um fáar vikur. Nærri verður boðað frá hesum seinni.

Hesir báðar brunnarnir er partur av av eini boriverkætlan hjá Faroe Petroleum, sum verður gjøgnumførd teir komandi 24 mánaðarnar, har 9 brunnar skulu borast.

# Tjaldur 135 milliónir eftir hæli

**2008 var sum eitt áhaldandi ódnarveður, har tað hevur verið torført at fóta sær, sigur felagið, sum fyrr var Skipafelagið Føroyar**

ROKNSKAPUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Íløgufelagið Tjaldur hevði eitt hall upp á 135 milliónir krónur í 2008. Hetta er leiðslan alt annað enn nøgd við. Felagið telist tó framvegis millum stóru feløgini í Føroyum, við eini eginogn í dag upp á umleið 100 milliónir krónur.

Í ársfrágreiðingini sigur felagið m.a.:

- Alt árið hevur verið sum eitt áhaldandi ódnarveður, har tað hevur verið torført at fóta sær, og mangt er farið í sor. Men mitt í øllum meldrinum hava vit miðvíst arbeitt við at tryggja framtíðarstøðið. Tað hevur í stóran mun eydnast at tillaga virksemið til tær broyttu umstøðurnar. M.a. er konsernskuldin minkað munandi, og við eini eginogn uppá 89 mio. kr. kunnu vit hóast alt gleðast um, at solvensurin er sera góður, heili 56%.

Spurdur um, hvar tað stóra tapið stavar frá, sigur Líggjas í Bø stjóri:

- Vit áttu nógv partabrøv frá fyrr av í flutningsfyritøkuni Eimskip. Til alla lukku seldu vit ein stóran part av hesum væl áðrenn kreppuna. Men tann parturin, sum var eftir, var hækkaður nógv i virði, men nú felagið fór av knóranum, var sjálvandi alt avskrivað. Restin stavar frá skrásettum partabrøvum, sum framvegis kunnu fara allar vegir. Tó, síðani ársbyrjan, hava tey verið positiv.

Um framtíðarútlitini sigur stjórin: -Vit hava lítla skuld, so tað skal góður vilji til at vera alt ov dapurskygdur. Umframt børsskrásettu partabrøvini, eigur Tjaldur m.a. partar í Vónini, Bakkafrost og Havsbrún.



*Líggjas í Bø er stjóri í Tjaldri, og Rúni M. Hansen er nevndarformaður*
*Mynd: Dávur Winther*

# Familjugudstænasta á Argjum

Komandi sunnudagin 30. august verður familjugudstænasta í Argja kirkja klokkan 11 við Bergi D. Joensen. Allir aldrar eru bodnir, og heystog várkonfirmantarnir møta eisini. Sum nakað nýtt verður kirkjukaffi aftaná, har okkurt verður til børnini eisini. Øll eru vælkomin, sigur Bergur Debes Joensen, prestur.

